# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Gullbrúðarparið Ása og Jógvan Rasmussen í Miðvági



Góðu mamma og pápi, omma og abbi, langomma og langabbi.

Tit eiga fýra døtrar, 19 ommu- og abbabørn og 5 langommu- og langabbabørn, sum vilja ynskja tykkum hjartaliga tillukku við stóra degnum 19. november.

Vit eru rík, tí at vit eiga tykkum og tit eru rík tí tit eiga okkum. Hóast vit eru nógv so vita vit øll, at tit eru góð við okkum og at vit eiga hvør okkara stóra pláss í tykkara hjørtum. Tey allarflestu av okkum búgva í Føroyum, men sjálvt í Mexico, Italia og Esbjerg eiga tit eftirkomarar, sum elska tykkum og hava nógv heit, góð og trygg minnir at takka tykkum fyri. Putur-sukrið og kjøtið, sum vit plaga at fáa upp á breyð frá abba. At sleppa „hjálpa" abba við at koyra trukkin á flakavirkinum. Gongutúrarnir við ommu. Allar søgurnar um Jesuspápa og ikki minst teir góðu túrarnir norð á Slættanes við tykkum báðum. Kanska tit ikki eru greið yvir tað, men slík minnir eru ikki ein sjálvfylgja og tí dýrabær fyri okkum øll.

Takk fyri og kærar heilsur til tykkum bæði ynskja

**Jónvør, Finngerð, Conny og Anja Katrina, Helga, Birgit og Beinir Naomi, Joan og Bergur Vanja, Terje, Ása Diana, Daniel, Kira, Sarah, Flykra og Laicy Lín Mirjam, Sólja, Sámal og Pætur Sylvia, Bjarni, Tea Lý, Magnar og Andreas**

## Finleif í Glarsmiðjuni




*Listamaðurin Finleif Mortensen við málningaframsýningini í Glarsmiðjuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Listamálarin Finleif Mortensen av Argjum læt fríggjadagin upp ein málningaframsýning í Glarsmiðjuni í Havn**

Fríggjadagin 13. november læt listamaðurin Finleif Mortensen upp eina málningaframsýning við 13 málningum í Glarsmiðjuni í Dr. Jakobsensgøtu í Havn. Glarsmiðjan hevur eina deild, sum eitur Hornið, har framsýningin er.

Finleif, sum er argjamaður og býr á Argjum, hevur bygt sær sær nýtt atelier á Strondum, har hann hevur málað allar málningarnar á framsýningini.

Finleif hevur seinastu árini havt nógvar framsýningar bæði í Føroyum og uttanlands. Framsýningin hjá Finleifi í Glarsmiðjuni verður nakað inn í desember mánað. Málningarnar eru eisini at síggja á heimasíðuni: www.glarsmidjan.fo

*- red*

# MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin hin 18 nov. verður Eydna Hansen, Fuglafjørður, 60 ár. Dagurin verður hildin heima hjá soninum Hans Hansen, Hjallavegur 56, Saltangará, leygardagin hin 21. nov. frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 20. nov. verður Jørleif Hansen, Fuglafjørður, 75 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 21. nov. fyllir Marianna Joensen, Kvívík, 80 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 11 til 18.

**85 ára føðingardagur**
Mikudagin 18. nov. fyllir Hanna Justinusen, Leirvík, 85 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 24. nov. hava hjúnini Oluffa og Niels Andreasen, Klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verur hildin í K.F.U.M & K Klaksvík, fra kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Gullbrúdleyp**
Hósdagin 19. nov. hava hjúnini Ása og Jógvan Rasmussen, í Miðvági, gullbrúðleyp. Dagurin verur hildin heima, frá kl. 16. Øll eru vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 21. nov. hava hjúnini Annelena og Arnstein Niclasen, Hoyvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni í Hornahúsinum í Havn.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 22. nov. hava hjúnini Elsipa Jóhanna og John Frederiksen, í Miðvági, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima frá kl. 16.

**Gullbrúdleyp**
28. nov. hava hjúnini Tóra og Ólavur Nolsøe Olsen, Fuglafjørður, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík leygardagin 5. des. kl. 18. Tey ið vilja halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 444159 - 737751 ella toraolavur@gmail.com áðrenn 20. nov.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. hava hjúnini Jóna og Kjartan Z. Jacobsen, Klaksvík, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Skálanum frá kl. 18. Tey ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á heimatlf. okkara 455646, tlf. 224750 og tlf. 225698, til og0 við leygardagin 21. nov.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppa diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

### Dagurin

**18. november. Hesychius**, deyður umleið ár 300. Hann var heryvirmaður í Antiokia, tá ið keisarin Diocletianus ráddi. Hann varð tikin av døgum fyri trúar sakir

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*